Sea Shepherd:

# Føroyingar dyrka Satan

**GRIND – Drápini eru byrjað tíðliga í ár í teimum ræðuligu oyggjunum við at drepa 60 verjuleysar hval í morgun, sigur Sea Shepherd, sum leggur føroyingar undir at dyrka Satan**



Eirikur Lindenskov

Sea Shepherd hevur fingið sendandi myndir av grindadrápinum í Vestmanna hósdagin, og tað hevur fingið felagsskapin at skriva um »the Ferocious Isles« - ræðuligu oyggjarnar. Tey hótta aftur við at koma til Føroyar í summar:

– Sea Shepherd Conservation Society fer við skipum sínum til Føroya í summar fyri enn einaferð at leggja uppí og verja hvalirnar frá ótangum, sum myrða hesi vøkru djórini frá hond.

Men ikki øll eru eins hjartaleys, skrivar Sea Shepherd.

– Onkrar djarvar sálir mótmæla sínum sadistisku landsmonnum, og ein stuðul hjá okkum í Føroyum hevur sent okkum hesar myndir, og hann skrivar til okkara, at »eg vildi ynskt, at She Shepherd var her. Drápið gekk ikki skjótt fyri seg, og nakrir hvalir brúktu 01:59 minuttir at doyggja... ræðuliga at síggja«.

- Sea Shepherd hevur fyrr verið í Føroyum, men hesa ferð fara vit til Føroyar sterkari, betri útgjørd og vil fleiri royndum enn nakrantíð, og vit hava eina tøkni við, sum fer at verða góð fyri hvalirnar í summar. Til ta tíð - til skip okkara røkka blóðugu strondunum í Føroyum - hava slagtararnir fríar teymar at pína og fremja hetta ónda drápið av heilum familjum av blíðum, fantastiskum hvalum, skrivar Sea Shepherd.

Sagt verður, at Sea Shepherd verður í farvatninum kring Føroyar. Tey fara at vera á strondunum, og tey fara at vera í luftini. Tey fara at vera aktiv í Danmark, og tey ætla at skapa stríð, sum skal hoyrast kring allan heimin. - Vit ætla, at hetta ólógliga dráp skal enda, sigur felagsskapurin.

Sea Shepherd skrivar eisini, at tað eru blíð og klók fólk í Føroyum, sum hava livað við hesi skommini í áravís, og sum hava verið bangin fyri at sagt sína hugsan av ótta fyri avleiðingum.

- Men nú er tíðin komin at møta ræðuskítunum í Føroyum, sum reypa um, hvussu Gud gav teimum grindina ella rættin til at vaða í blóði og særa hvalir, taka fostrini frá líkunum av mammunum og til at stinga, steina og pína hvalirnar til deyða. Tey kalla drápið eina »gávu frá Gudi«.

At enda skrivar Sea Shepherd, at tann einasti gudur, sum kann góðtaka slíka ræðslu er Satan, og Føroyar tykjast tæna sínum ónda gudi við sínum drápsliga hugburði verja eina barbariska mentan, sum einki pláss eigur í 21. øld, sum ikki hoyrir heima í siviliseraða heiminum og sum als einki pláss eigur í Evropasamveldinum.

*eirikur@sosialurin.fo*

## *Keypt Bacalao fyri 9,5 mió kr*

Øll virkini hjá Faroe Seafood eru seld áðrenn tvingsilssøluna, sum skuldi vera í dag, og Tórshavnar Kommuna hevur keypt bygningarnar í Havn. Tórshavnar Býráð hevur í morgun samtykt at keypa bygningarnar hjá Faroe Seafood á Vestaru Bryggju fyri 9,5 miljónir kr. Frammanundan høvdu bæði havnarnevndin og fíggjarnevndin einmælt samtykt at mæla býráðnum til at keypa. Kommunan eigur frammanundan grundøkið og partar av bygningunum, t.d. saltsøluna og tunnuvirkið, og tí var nátúrligt hjá kommununi at fáa ræðisrætt yvir henda partin eisini. Kaupthing hevur boðað frá, at bankin sum veðhavari hevur góðtikið, at ognirnar verða seldar Tórshavnar kommunu fyri 9,5 miljónir uttan rakstrargøgn. Havnar Arbeiðsmannafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag hava arbeitt við eini ætlan at keypa maskinurnar, meðan kommunan skuldi keypa bygningarnar. Men Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag sigur, at tey hava ikki keypt maskinurnar - enn í hvussu so er. Hann hevur so einki frætt um tað, tí er ógreitt, um talan er um formalitetir, ella um onkur annar hevur keypt maskinurnar. Delta Seafood hevur keypt virkið á Tvøroyri, meðan vit enn ikki hava fingið uppspurt, hvør hevur keypt virkið í Miðvági.

## Í MORGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 4 og 7 stig.

## MIKUDAGIN




Lot til andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 5 og 8 stig.

## HÓSDAGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og fyrrapartin regn, seinnapartin ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, leygardagin hækkan hann upp í vestan. Sólglottar, men eisini ælingur, leygardagin møguliga vátaslettingur. Hitin millum 2 og 6 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt djúpt lágtrýst, 965 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstini norðanfyri og vestanfyri Íslandi fara spakuliga í landnyrðing og geva áhaldandi útsynningsveður á okkara leiðum.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 88 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | -9 | Tromsø | -1 | Moskva | -13 | Athen | 14 |
| Reykjavík | 8 | Bergen | -2 | Berlin | -6 | Beijing | 11 |
| Tórshavn | 7 | Oslo | -9 | Paris | 3 | New Dehli | 20 |
| Lerwick | 4 | Stokkhólm | -6 | Madrid | 15 | Bangkok | 32 |
| Aberdeen | 7 | Keypmannah. | -4 | Róm | 11 | Sydney | -- |
| London | 8 | Helsinki | -19 | Malorca | 15 | New York | 2 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

2. apríl – Mánin longst frá jørðini
11. apríl – Fyrra kvarter
17. apríl – Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. apr | 00:45 | 13:23 | - | 12:23 | 00:00 | 12:38 | 02:45 | 15:23 | 03:45 | 16:23 | 11:38 | - | 10:38 | 23:16 | 01:00 | 13:38 | 02:00 | 14:38 | 00:30 | 13:08 | 01:45 | 14:23 |
| 12. apr | 02:01 | 14:38 | 01:01 | 13:38 | 01:16 | 13:53 | 04:01 | 16:38 | 05:01 | 17:38 | 00:16 | 12:53 | 11:53 | - | 02:16 | 14:53 | 03:16 | 15:53 | 01:46 | 14:23 | 03:01 | 15:38 |
| 13. apr | 03:16 | 15:40 | 02:16 | 14:40 | 02:31 | 14:55 | 05:16 | 17:40 | 06:16 | 18:40 | 01:31 | 13:55 | 00:31 | 12:55 | 03:31 | 15:55 | 04:31 | 16:55 | 03:01 | 15:25 | 04:16 | 16:40 |
| 14. apr | 04:04 | 16:27 | 03:04 | 15:27 | 03:19 | 15:42 | 06:04 | 18:27 | 07:04 | 19:27 | 02:19 | 14:42 | 01:19 | 13:42 | 04:19 | 16:42 | 05:19 | 17:42 | 03:49 | 16:12 | 05:04 | 17:27 |
| 15. apr | 04:51 | 17:14 | 03:51 | 16:14 | 04:06 | 16:29 | 06:51 | 19:14 | 07:51 | 20:14 | 03:06 | 15:29 | 02:06 | 14:29 | 05:06 | 17:29 | 06:06 | 18:29 | 04:36 | 16:59 | 05:51 | 18:14 |